## UTTAN ÚR HEIMI



*Umleið 200.000 viðhaldsfólk hjá andstøðuleiðaranum Viktor Justjenko kringsettu forsetaborgina fyrrakvøldið*

*Mynd: Reuters*

# Á eggini til borgarakríggj

**Andstøðan í Ukraina hevur tikið sítt egna valevni í eið sum forseti, og í fleiri av teimum stóru býunum nokta myndugleikarnir at gera eftir boðum frá øðrum enn honum**

UKRAINA
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Løgfrøðiliga hevur forsetaeiðurin hjá Viktor Jusjtjenko ongan týdning, men fyri ta ukrainsku andstøðuna er hann ímyndin av kravinum um, at tað almenna valúrslitið verður ógildað, ella at myndugleikarnir viðurkenna, at Jusjtjenko var tann veruligi vinnarin.

Fagnaðurin mundi ongan enda fingið, tá andstøðuleiðarin legði hondina á bíbliuna og svór forsetaeiðin. Vesturlendskir eygleiðarar halda, at umleið 200.000 fólk stóðu uttan fyri tinghúsið og fagnaðu honum.

Fyrradagin royndi andstøðan at fáa tjóðartingið at samtykkja eitt uppskot um misálit á valnevndina og valúrslitið, men hon mátti sleppa ætlanini, tí bara 191 tinglimir játtaðu at atkvøða fyri. Skuldi uppskotið samtykkjast, máttu minst 226 av teimum 450 tinglimunum atkvøða fyri tí.

Andstøðan hevur svorið, at hon fer at halda fram við sínum tiltøkum, til myndugleikarnir slaka. Í gjár frættist, at býarmyndugleikarnir í fleiri av teimum størstu býunum, teirra millum høvuðsstaðnum Kiev og býunum Lviv, Lutsk og Khmelnitskij, hava boðað frá, at teir fara ikki at gera eftir boðum frá nøkrum øðrum enn Jusjtjuenko. Samsundis ljóðaði, at kolanámsarbeiðsmenninir, sum eru fleiri túsund í tali, ætla sær til Kiev at taka lut í tiltøkunum hjá andstøðuni.

Tað er heldur ikki bara andstøðan, sum er misnøgd við tað almenna valúrslitið. Umleið 150 ukrainskir diplomatar kunngjørdu í gjár eina fráboðan, har teir søgdu seg vera vónsviknar av myndugleikunum.

- Vit, sum eru ukrainskir diplomatar, mótmæla forsetavalinum og teirri sannroynd, at valið gjørdist eitt skammiligt kríggj ímóti okkara egna fólki, stóð millum annað í kunngerðini frá diplomatunum.

Russland er fyribils einasta landið, sum alment hevur viðurkent tað almenna úrslitið av forsetavalinum sunnudagin. Vladimir Putin, forseti, hevur alment stýðjað valevnið hjá stjórnini, Viktor Janukovitj, og Putin hevur biðið ukrainska fólkið virða úrslitið og landsins lógir.

Í ES eru tað altsamt fleiri, sum mæla til at seta tiltøk í verk ímóti Ukraina, eftir at óheftu valeygleiðararnir hava kunngjørt, at valið var ikki demokratiskt. Danski forsætisráðharrin, Anders Fogh Rasmussen, segði fyrradagin, at vilja teir ukrainsku myndugleikarnir ikki samstarva, eigur tað at fáa avleiðingar.

### Vil royna semju

Fyrrverandi polski forsetin Lech Walesa hevur boðið sær til at royna semju ímillum myndugleikarnar og andstøðun í Ukraina. Hann segði við tíðindastovuna AP í gjár, at hann hevur fingið eina áheitan frá Viktor Jusjtjenko um at virka sum semingsmaður, men at hann fer ikki til Ukraina, fyrr enn Leonid Kutsjma, forseti, góðtekur tað.

Sjálvur er Walesa ikki í iva um, hvussu týdningarmikið valið í Ukraina er.

- Virkar Ukraina ikki eftir teimum demokratisku prinsippunum, endar landið undir russiskum harradømi eins og Hvítarussland. So fáa vit Sovjetsamveldið umaftur, men í einari nýggjari útgávu, sum verður vandameiri enn tann fyrra, og tí mugu vit gera alt, sum gerast kann fyri at gera Ukraina til eitt demokratiskt land, sigur Walesa við AP.

Polski forsetin, Aleksander Kwasiniewski, hevur mælt evropeiskum leiðarum til at fáa partarnar til samráðingarborðið. Hann hevur skotið upp, at uttanríkiskommiserurin hjá ES, Javier Solana, skal virka sum millummaður.

## Avmyndar ferðafólk nakin

Í Heathrow-floghavnini í London eru eftirlitsmyndugleikarnir farnir at royna eitt tól, sum kann avdúka, um ferðafólk ætla at taka vápn við sær í flogfarið.

Talan er um eitt tól, sum tekur røntgenmyndir av ferðafólkunum. Myndirnar síggjast á einum skíggja, og tær avdúka, um viðkomandi hevur nakað vápn uppi á sær. Men trupulleikin er, at myndirnar avdúka eisini, hvussu fólk síggja út innan fyri klæðini, og tað eru øll ikki líka fegin um. Eitt nú hevur bretski borgararættindafelagskapurin Liberty mótmælt nýggja eftirlitinum, tí hann vil vera við, at myndirnar eru alt ov ágangandi og avdúkandi.

Susann Hallowell, sum er stjóri á tí stovninum, sum hevur ábyrgdina av flogtrygdini í USA, hevur roynt tólið, og hon letur væl at tí. Hon var ikki bangin fyri at lata seg avmynda, tá hon fyri nøkrum døgum síðani vísti tíðindafólkið tað nýggja tólið, sjálvt um myndin á skíggjanum vísti hana nakna.

Men hóast stjórin er fegin um nýggja tólið, hava amerikonsku trygdarmyndugleikarnir kunngjørt, at teir ætla sær ikki at seta tólið upp í amerikonsku floghavnunum. Grundgeving teirra er, at tólið gongur fólki ov nær.

Tað serliga røntgentólið verður longu brúkt í fongslum, so fangavørðarnir kunnu kana, um vitjandi hava nakað ólógligt uppi á sær, tá tey koma at vitja fangarnar. Í Suðurafrika verður tólið eisini brúkt í gullnámunum fyri at forða fyri, at námsarbeiðsmenn taka gull við sær til hús.

Bretsku trygdarmyndugleikarnir hava ikki enn gjørt av, um teir skulu brúka skipanina. Fyribils verður hon roynd í Heathrow, og sambært starvsfólkunum hava tey flestu ferðafólkini einki ímóti at lata seg avmynda, sjálvt um tey framanundan fáa at vita, at skíggin fer at vísa tey nakin.

Fyritøkan, sum ger tað nýggja eftirlitstólið, viðgongur, at tað kann vera eitt sindur óheppið, at allur kroppurin verður vístur nakin, og tí verður arbeitt við at laga tólið soleiðis, at summir partar av kroppinum verða fjaldir, skrivar AP.

### Gomul lóg skal burtur

Síðani 1948 hevur tað verið bannað fólki í Suðurkorea at siga nakað rósandi um grannalandið Norðurkorea, men nú ætlar stjórnin at taka lógina av.

Roh Moo Hyun, forseti, heldur, at lógin er ikki tíðarhóskandi longur. Hon bleiv sett í gildi í sínari tíð fyri at forða fyri, at politiskar hugsjónir skuldu breiða seg suður um markið ímillum tey bæði koreansku londini, eins og hon skuldi forða fólkið í báðum londunum at ferðast um markið. Men hetta er ein farin tíð, sigur forsetin, sum kallar lógina eina leivd frá Kalda krígnum.

Tað eru kortini ikki allir suðurkoreanar, sum eru samdir við forsetanum. Nógvir konservativir suðurkoreanar halda, at stjórnin slakar ov nógv fyri tí kommunistiska stýrinum í Pyongyang.

Politikarar hjá andstøðuni eru ímóti ætlanini hjá forsetanum. Teir siga seg stúra fyri, at uttan galdandi lóg fara sjónarmiðini hjá norðurkoreanska stýrinum at festa røtur í Suðurkorea. Teir vísa á, at sambært fregnartænastuni hevur Norðurkorea umleið 40.000 agentar í Suðurkorea.



